# og bygdalega

við síðuna av hvørjum øðrum í flúgvaranum. Eg var tystur og harmur um at koma at sita viðsíðuna av presti í hesi flúgvandi barr. Hann var broyttur. Vinsælur og blíður og hevði ikki ein gang at mær, tá íð er foyur segði jatakk til fyrsta sjussin, og eitt sindur bragdligari játtaði næsta, tá íð blíðu flogternurnar bjóðaðu. Kanska var tað heilt garvilt við vekingini á Strondum fyrst í sjeytiárunum, tí Magnussen mintist einki til, at hann hevði fermt meg. Nú er hann eisini farin, og friður verið við minninum um hann. Eg havi ongar ringar tankar um hann, slettis ongar. Hann var sannførdur av sonnum og gjørdi bert tað sum hann helt vera best fyri okkum.

## Send okkum vekjunnarond

Tað eru ligin 35 ár og nú siti eg aftur í syngi sangir úr heimamissiónssangbókini í leguhúsinum í Nesvík. Eg eri í góðum selskapi millum bygdamenn og tað er kend fólk, sum stíla fyri sangløtuni. Tað er leygarkvøld og bygdarlegan við oyndfirðingum nærkast tí næstu náttini í Nesvík.

"Send tínar streymar av náði, send okkum vekingarond" rungar í hesi stóru høllini, sum kann rúma fleiri ferðirnar fólkatalinum í Oyndarfirði. Tað eru tveir strandingar, sum eru boðsendir at skipa fyri sangløtuni, Símun og Emil. Eg kenni teir, havi hitt teir í øðrum høpi í mínum ungu døgum, og tá sungu vit ikki úr Heimamissiónsbókini. Vit hittust fyri tað mesta í eini dansistovu, sum slett ikki er til longur, og sum lá fyri endan á Kjerligheitsstiganum á Strondum.

Teir duga væl, harmonikan er frammi og guitarurin við og sangur sameinir.

Beint áðrenn høvdu vit hugt eftir filmi frá mínum barnaárum. Harald Petersen vísti á hvíta løritinum hvussu aldurin fer við fólki. Filmurin var frá seinast i sekstiárunum. Her var víst frá konfirmatiónum og føðingardøgum. Nú hongur tað soleiðis saman, at eg og Harald eru næsmastu skyldmenn, mamma og hann eru systkinabørn og tí var tað mín familja sum vóru høvuðsleikararnir í filminum.

Eg sá eitt glimt av mær sjálvum eisini. Halgadoyð eg eri broyttur nógv hesi seinastu 40 árini, og tað vóru hini eisini, also tey sum ikki eru deyð. Undirlutakenslan í barnaárunum førdi til at eg helt meg ikki vera serliga vakran sum barn. Tá eg nú síggi meg aftur á filmi 40 ár seinni, standi eg einki aftanfyri nakran annan í vakurleika. Eg sendi heitar og vakrar tankar til henda fitta smádrongin í vakrari mynstrutari føroyskari troyggju.

Er tú ikki fyrireikaður, so kann tað vera ein nokk so ógvuslig hending at síggja film av tínum egna lívi soleiðis knappliga. Tað er sum at vera drigin inn í eina annan kendan heim, sum slett ikki er til longur.

Sum ein annar dogmefilmur byrjar leikurin við at Edward í Skálafirði fer gangandi oman gjøgnum bøin. Hann var gamal maður, tá íð eg var smádrongur og hann stóð fullkomiliga mát við myndina inni í mínum minni. Ein maður við serligari útstráling, giftur við langabbasystir míni Ebbu. Tað var høgtíðsdámur yvir bygdini, tá íð hann kom úr Skálafirði áðrenn vegurin kom. Hann steðgaði leingi, vitjaði nógv hús, var avhildin og frásøgumaður sum fáur. Eg minnist hvussu eg sum smádrongur sat steinrunnin, tá hann við kenning og serutt reypaði um farnar løtur, tá íð hann sum tann góði hirðin hevði leitað eftir seyði í ivaveðri Millum Fjarða. Gonguferðirnar um Helvtinia, tá hann fríggjaði sum ungur í Oyndarfirði vóru eins dramatiskar og tá íð Scott gekk seg í deyðan suður á Suðurpólin í 1912. Tvey ár frammanundan høvdu Edvard og Scott hugt eftir tí stóru Haley halastjørnuni sum mundi rakt jørðina. Edward var staddur umborð í eini slupp suðuri í Vági og Scott oknunstaðni í Bretlandi. Hon var so bjørt í 1910 at fólk trúði at evsta løtan var komin og Edward gjørdi ikki minni av, tá ið hann dramatiseraði hesa hending høgtiðskvøld í Oyndarfirði. Tað tekur kometini 76 ár at gera rundferðina. Hon var seinast her í 1986 og sæst ikki aftur fyrr enn í 2061 og tá verið eg so undir øllum umstøðum deyður.

Tannhjólið í orginala super 8 filmsvísaranum dróg filmin víðari við einum títt klikkjandi ljóði. Og so sluppu vit aftur í vegballið. Vegballið er eitt hugtak í Oyndarfirði sum tey tilkomnu ongantíð gloyma. Tað hava verið mong ball í bygdini, men vegballið er bara tað eina. Og tað er ballið, sum varð hildin tímar eftir at snórurin varð kliptur og Oyndarfjørður bleiv bundin í vegakervið í Eysturoy. Bygdin kemur ongantíð at uppliva slíka stórhending aftur, alt annað kámast samanborið við hesar dagar í november í 1968. Filmurin sýnir ikki sjálvt ballið, men heldur dagin eftir, tá íð ruddað var inni í gomlu húsunum í Víkum, har ballið varð hildið. Og siðsøguliga hava júst hesar hendingar størri týdning fyri bygdina, tí nú var bara talan um bygdarfólk og av teimum eru meginparturin einglar í dag og børnini á filminum eru um miðjan aldur.



*Forsagdir konfirmantar í Skálakirkju 1971. Frá vinstru Jákup Magnussen, sáli, prestur. Karstin Olsen av Skála. , Poul Dánjal Poulsen, Dánjal Johansen og Ragnar Danielsen av Strondum. Jústinus Eidesgaard, Oyndarfjørður. Símun Andras Andreassen, Andrias Gregersen og Suni Debes av Strondum. Símun Pauli Berg av Skála. Óli Jacobsen av Strondum og Arnbjørn Kristiansen av Skála. Genturnar eru við gentueftirnøvnum frá vinstru Ragnhild Johansen av Strondum. Jóhanna Danielsen av Skála. Elisabeth Djurhuus av Selatrað, Ansy Joensen av Strondum. Sigrun Berg av Skála. Joan Rasmussen, Simona Ljósá, Diana Johansen pg Jóna Rasmussen av Strondum.*

*Símun Andras av Strondum er deyður. Vit báðir hava Jesus mitt í millum okkum á myndini. Jóna var mítt fyrsta forelskilsi, men hon hevði slett ikki somu meining. Hon vildi heldur hava ein toftamann, og hon hevur hann enn. Tað kundi verið nógv skrivað um hesa myndina og hvussu hevur gingist okkum. Kanska hetta ættarliðið fer at hittast ein dag á Strondum og tosa um óspiltar dagar.*

*Mynd: Judith Johannesen*



*Ein lega uttan góðan mat er ongin lega. Frá vinstru Annie Nielsen, Magna Jacobsen, Sólgerð Leivsdóttir, Karin Joensen og Petra Magnina Joensen, sum verður silvurbrúður 21. april og lítla Petra, dóttir Duritu og Høgna í Oyndarfirði. Aftanfyri stendur høvuðskokkurin Kristjan í Langagarði, ættaður úr Oyndarfirði.*

*Mynd: Terji Nielsen.*

## Kirkjuklokkan tagnað

Tað er sunnumorgun í Nesvík, og kirkjuklokkan hongur still í torninum í kirkjuni í Oyndarfirði. Oyndfirðingar eru vaknaðir annan dagin í tí heilt fremmanda millum eystfall og vestfall beint norðanfyri Streymin. Teir hava etið morgunmat. børnini spæla bæði inni og úti, og spakuliga byrjar at anga av døgurða úr køkinum har Kristjan í Langagarði er einaráðandi sum kokkur.

Prestur er komin av Gjáranesi á Strondum. Jógvan Fríðriksson hevur nú í mong ár verið prestur hjá oyndfirðingum. Hann kennir síni sóknarbørn um nakrar fáar dagar fyllir hann 50. Tað er sunnudagur septuagesima og hann tosar um at øll hava tørv á somu løn andaliga sæð. Tann sum kemur seinast er eisini svangur og tørvar mettuna.

Vit syngja og setast við døgurðaborðið. Hamborgaryggur í ananas og ísur og kaffi omaná. Vit dusa okkum í reinari vælveru.

150 oyndfirðingar og tað kundu verið fleiri. Teir koma næsta ár, tí hóast karmurin er missión, so snýr ein slík lega seg fyrst og fremst um sosiala samveru millum kent fólk, sum eru ein partur av okkara lívi, knýtt saman av familjubondum og bondum spunnin av tí at hoyra til eina bygd.

Vit síggjast komandi ár og serliga hugaligt verður at síggja tey, sum ikki vóru við í ár.